EM-toppskjúttar

Tomasson	Danmark	4
Wiltord	Frakland	4
Henry	Frakland	4
Beckham	Ognland	3
Gudjohnsen	Ísland	3
Del Piero	Italia	3
Contra	Rumenia	3
Semak	Russlan	3
Akin	Turkaland	3
Gera	Ungarn	3
Hartson	Wales	3
Petersen	Føroyar	2

EM-undankappingin

Bólkur 1

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Frakland	4	4 - 0 - 0	17	1	16	12
2 Ísrael	2	1 - 1 - 0	3	1	2	4
3 Kypros	3	1 - 1 - 1	4	4	0	4
4 Slovenia	2	1 - 0 - 1	3	5	-2	3
5 Malta	5	0 - 0 - 5	1	17	-16	0

Bólkur 2

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Danmark	3	2 - 1 - 0	9	4	5	7
2 Noreg	3	2 - 1 - 0	5	4	1	7
3 Rumenia	4	2 - 0 - 2	12	6	6	6
4 Bosnia Hersegovina	3	1 - 0 - 2	2	5	-3	3
5 Luksemburg	3	0 - 0 - 3	0	11	-11	0

Bólkur 3

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Holland	3	2 - 1 - 0	7	1	6	7
2 Kekkia	3	2 - 1 - 0	5	1	4	7
3 Eysturríki	3	2 - 0 - 1	4	3	1	6
4 Moldova	4	1 - 0 - 3	1	6	-5	3
5 Hvítarussland	4	1 - 0 - 3	2	8	-6	3

Bólkur 4

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Letland	3	2 - 1 - 0	2	0	2	7
2 Ungarn	3	1 - 2 - 0	4	1	3	5
3 Póland	3	1 - 1 - 1	2	1	1	4
4 Sveriki	2	0 - 2 - 0	1	1	0	2
5 San Marino	3	0 - 0 - 3	0	6	-6	0

Bólkur 5

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Skotland	3	2 - 1 - 0	6	3	3	7
2 Týskland	3	2 - 1 - 0	5	2	3	7
3 Litava	4	1 - 1 - 2	3	6	-3	4
4 Ísland	3	1 - 0 - 2	4	4	0	3
5 Føroyar	3	0 - 1 - 2	3	6	-3	1

Bólkur 6

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Spania	3	2 - 1 - 0	7	2	5	7
2 Ukraina	4	1 - 3 - 0	6	4	2	6
3 Armenia	3	1 - 1 - 1	3	4	-1	4
4 Grikkaland	3	1 - 0 - 2	2	4	-2	3
5 Norður Írland	3	0 - 1 - 2	0	4	-4	1

Bólkur 7

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Turkaland	3	3 - 0 - 0	10	1	9	9
2 Ongland	3	2 - 1 - 0	6	3	3	7
3 Slovakia	3	1 - 0 - 2	3	5	-2	3
4 Makedonia	4	0 - 2 - 2	4	7	-3	2
5 Liktenstein	3	0 - 1 - 2	1	8	-7	1

Bólkur 8

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Bulgaria	3	3 - 0 - 0	6	1	5	9
2 Belgia	4	2 - 0 - 2	2	6	-4	6
3 Kroatia	3	1 - 1 - 1	4	2	2	4
4 Estland	2	0 - 1 - 1	0	1	-1	1
5 Andorra	2	0 - 0 - 2	1	3	-2	0

Bólkur 9

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Wales	4	4 - 0 - 0	10	1	9	12
2 Italia	4	2 - 1 - 1	6	3	3	7
3 Serbia & Montenegro	3	1 - 2 - 0	5	3	2	5
4 Finnland	4	1 - 0 - 3	3	6	-3	3
5 Aserbadjan	5	0 - 1 - 4	2	13	-11	1

Bólkur 10

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Sveis	3	2 - 1 - 0	7	3	4	7
2 Russland	3	2 - 0 - 1	9	6	3	6
3 Albania	3	1 - 1 - 1	5	6	-1	4
4 Írland	3	1 - 0 - 2	5	7	-2	3
5 Georgia	2	0 - 0 - 2	2	6	-4	0

Neistin-VÍF 20-23 (4-13):

Mál-leysar neistakvinnur

Í 20 minuttir megnaði Neistin als ikki at skora, og tað nýtti VÍF til at tryggja sær stigini

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Seinastu vikurnar hevur kvinnuliðið hjá Neistanum fingið hampuliga nógva ferð á. Somikið nógva, at bronsumerkini vóru í eygsjón, men skuldu hesi gerast veruleiki, var helst neyðugt við sigri á VÍF, sum vitjaði sunnudagin.

Ein ikki heilt ómøgulig uppgáva. Kanska serliga tí VÍF ikki longur hevur stórvegis at spæla fyri, nú silvurmerkini helst verða veruleiki, men tað eydnaðist so ikki Neistanum at vinna.

Svørt løta

Og orsøkin til hetta var sera einføld. Eina langa løtu miðskeiðis í dystinum snøgt sagt stongdu gestirnir hurðina. Tað hevði annars gingið javnt á fyrstu løtuna, og tá 12 minuttir vóru leiktir, stóð 4-5 á talvuni, men so steðgaði alt upp.

Neistin skoraði ikki restina av hálvleikinum, og tá VÍF samstundis hevði strítt seg upp á 13 mál, tóktist alt avgjørt.

Men tað var tó um reppið, at Neistin kortini koppaði øllum. Við trivaligu leiðsluni í viðførinum, hildu gestirnir ivaleyst, at tær nú kundu taka sær av løttum, men hetta var um reppið at kosta teimum sigurin. Neistin hevði nevnliga als ikki givið skarvin yvir. Spakuliga togaðu tær seg inn aftur í dystin, og átta minuttir fyri leiklok var bert eitt mál á muni.

VÍF fekk tó svarað aftur við tveimum málum á rað, og tó at Neistin royndi at svara aftur, so var ikki meira eftir. VÍF fekk stigini, sum Neistin hevði ætlað sær, og ivaleyst merkir hetta, at bláa kvinnuliðið í ár noyðist at góðtaka, at talan als ikki verður um heiðursmerki.

Dysturin í tølum

Neistin-VÍF 20-23 (4-13)

Málskjúttar:
Neistin: Simona Dziugyte 9(3), Christina Holm 3, Lív Sørensen 3, Mildrið Jacobsen 2, Rakul Augustinussen 2, Súna Mørk 1
VÍF: Sóley Mikkelsen 8(2), Jacklin Durhuus 6(1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 4, Alis Høghamar 2, Nicoleta Radu 2, Fríða Marjunardóttir 1
Brotskøst: Neistin 4, VÍF 3
Útvísingar: Neistin 1, VÍF 2
Dómarar úr Tjaldur: Hartvig Joensen & Trygvi Hansen.

Neistin-VÍF 21-28 (9-15):

Klárt til gulldyst

VÍF vann næst seinasta dystin á árinum, og nú er alt klárt til gullbrakið í Vestmanna, sum verður tann 12. apríl

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Seinastu vikurnar hava treytirnar hjá VÍF verið púrasta greiðar. Teir skulu syrgja fyri at vinna sínar dystir, soleiðis at teir við einum sigri á StÍF á seinasta leikdegi kunnu fara framum við betri málmuni enn strandingar.

Og seinasti setningurin av fyrireikingunum var á Hálsí í Havn sunnudagin, tá VÍF vitjaði Neistan. Ein dystur, sum hvørgin parturin hevði ráð at tapa, men har VÍF tó mundi standa sum størsti favoritturin.

Við sigrinum á Neistanum hevur VÍF nú gjørt klárt til ein altavgerandi dyst í seinasta umfarinum

Skjúttarnir fingu frið

Og tað vísti seg eisini skjótt, at henda áskoðanin var grundað. Vestmenningar vóru frá byrjan betra liðið, og serliga vóru tað sterku skjúttarnir, sum høvdu lætt við at sleppa framat, og tá er tað sum so líka mikið, hvussu málverjin hjá mótstøðumonnunum eitur.

Serliga seinasta partin av hálvleikinum skrædnaði hjá Neistanum, og teir á heimaliðnum funnu ongan tíð nakað vápn, til tess at steðga gulu maskinuni. Eitt skifti í seinna hálvleiki fingu teir tó minkað nakað um munin, men tá tað tók at sansa at, settu vestmenningarnir aftur ferð á, soleiðis at seinasti ivin kundi beinast langt av leið.

Gulldystur

Og við hesum er klárt til gulldystin, sum hondbóltsáskoðarar hava bíðað í spenningi eftir, líka síðani StÍF vann heimadystin ímóti VÍF. Gaman í kunnu strandingar enn kiksa, men fáa teir bara eitt stig í teimum báðum næstu dystunum, so verður talan um avgerandi dyst í seinasta umfarinum. Og hinvegin. Fáa teir ikki nakað stig hesar báðar dystirnar, so hava teir heldur ikki ein gulldyst uppibornan, somikið einfalt er tað.

Dysturin í tølum

Neistin-VÍF 21-28 (9-15)

Málskjúttar:
Neistin: Morgan Knezevi 5(2), Ragnar Stakksund 5, Áki Mørk 4, Helgi K. Justinussen 3, Birgir KAss 1, Jón Ludvig 1
VÍF: Áki Olsen 9, Daniel Rápa 5, Ingi Olsen 4(1), Ólavur Brimnes 4, John Zachariasen 3, Áki G. Olsen 2, Agnar Joensen 1
Brotskøst: Neistin 2, VÍF 1
Útvísingar: Neistin 1, VÍF 1
Dómarar úr Tjaldur: Hartvig Joensen & Trygvi Mortensen.

TB-NSÍ 0-3 (0-2):

Steypavinnararnir verja borg

Ánararnir av Løgmanssteypinum hava eftir tvey umfør fult stigatal, og tykjast halda beina kós víðari í kappingini

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákp Mørk

Eftir sigurin á TB eru runavíkingarnir mest sum vísir í at koma víðari í steypakappingini
Mynd: Áki Bertholdsen

Eins og í restini av landinum, so var veðrið einki serligt, tá NSÍ vitjaði á Tvøroyri um vikuskifitíð. Regn og heglingsæl skolaðu oman yvir leikararnar frá fyrsta bríksli, og nógvi vindurin gjørdi tað trupult at fáa nakað samanhangandi spæl.

TB hevði vindin undan fyrra umfarið, men tað gekk ógvuliga striltið at gera sær dælt av hesum. Mest sum allar álopsroyndir endaðu við at bólturin rann undan teimum, og um hálva tíman gekk brádliga galið í hinum endanum. Sonni L. Petersen fekk bóltin í høgru, og hann gjørdi ikki mætari enn at seta beina kós móti málinum, og við einum frálíkum skoti sendi hann bóltin í kassan.

Hett tóktist eisini verða hálvleikstøðan, men beint undan steðginum fekk TB tað, sum liktist mønustinginum. NSÍ hevði vunnið hornaspark, og tá hetta varð sent innfyri, var hart kroystur verjuleikari hjá TB somikið óheppin, at hann beindi bóltin í egið mál.

Seinna hálvleik var veðrið kanska nakað betri, men fyri tað bøtti tað ikki so nógv um spælið. Runavíkingar høvdu mest sum tryggjað sær sigurin, og teir ansaðu væl eftir ikki at overa seg, men teir fingu tó eitt mál afturat.

Hetta kom, tá TB-verjan snorksvav, tí teir hildu bóltin vera uttan fyri síðulinjuna. Sonni L. Petersen hevði tó sæð møguleikan, og eftir at hava drigið nakað, spældi hann Jónstein Petersen púra leysan, so hesin hevði lætt við at skora.

Soleiðis eru runavíkingar nú væl áleiðis í bólkaspælinum, har teir hava fingið seks stig fyri tveir dystir. Vanliga verður mett, at eini nýggju stig eru nóg mikið at koma víðari við, og sum støðan er nú, so vildi tað verið løgið, um steypavinnararnir ikki fáa hetta.

Tvøramenn hava hinvegin framvegis bert tað eina stigið, sum teir fingu í fyrsta umfarinum, og við trimum úti- og einum heimadysti eftir kann tað gerast meira enn trupult hjá teimum at vinna seg víðari.

Dysturin í tølum

TB-NSÍ 0-3 (0-2)
0-1: Sonni L. Petersen
0-2: Sjálvmál
0-3: Jónstein Petersen

HB-B36 2-0 (0-0):

Enn eigur HB Havnina

Meðan meistararnir úr HB longu tykjast hava bílagt sær pláss í fjórðingsfinaluni, stendur av álvara á hjá B36 eftir tvey tap á rað

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákup Mørk

Grannauppgerð var á skránni í Gundadali sunnudagin, tá HB og B36 hittust í fyrsta sínamillum dystinum á árinum. Ein dystur, sum vanliga savnar nógv viðhaldsfólk, og har spælið í nógvum førum hevur verið av tí heilt undirhaldandi slagnum.

Stríðssigur

Dysturin sunnudagin verður tó ikki hann, sum fer at standa fremst í hugaheiminum hjá áskoðarunum fyri vakra spælið. Heldur var talan um ein dyst, har báðir partar royndu at stríða seg til sigurs, og sum so eydnaðist hetta betri hjá stóraleiggjanum úr HB.

Sum skilst úr Gundadali, so var fyrri hálvleikur sera linligur, hvat málmøguleikum viðvíkur, men tað var tó HB, sum hevði leikligu yvirvágina.

Hetta helt eisini fram í seinna hálvleiki, men tað var tó um reppið, at B36 legði seg á odda, tá Heðin á Lakjuni einsamallur við málverjanum sendi bóltin framvið málinum.

Men teir úr HB svaraðu skjótt aftur, og tá teir høvdu møguleikan, var neyvleikin nógv størri. Fyrsta málið fingu teir, eftir at Carsten From hevði vunnið sær frískpark í vinstru. Nico Dugaru sendi bóltin innfyri, og har kundi ein leysur Tór-Ingar Akselsen snitta bóltin víðari í málið til stóra frøi fyri bæði seg, liðfelagar og áskoðarar.

Tepra leiðslan tóktist at skula halda allan dystin, tí hóast málið, so megnði B36 ikki at seta so mikið av ferð á, at HB veruliga kom undir trýst. Hinvegin vóru teir úr HB nú eisini meira varnir, men stutt fyri leiklok fingu teir tó staðfest sigurin.

Carsten From, sum annars varð mettur sum sera ivasamur undan dystinum, vann sær aftur fríspark uttan fyri brotsteigin. Hesa ferð gjørdi álopsmaðurin av, at hann skuldi skjóta sjálvur, og uttan stórvegis hóvasták hamraði hann bóltin í meskarnar.

Krepputos

Við sigrinum staðfesti HB, at teir eisini í ár ætla sær langt í steypakappingini, soleiðis sum teir eru vanir við. Og einki er at ivast í, at sigurin á grannunum í nógvar mátar styrkti um sjálvsálitið. Ikki minst í verjupartinum, sum annars tóktist vera stóra spurnartekini á liðnum undan kappingini. Álopið mátti hesa ferð standa seg uttan skadda Andrew av Fløtum, og hóast saknurin í honum var sjónligur, so stóð liðið kortini royndina.

Hjá B36 man lagið hinvegin vera alt annað enn gott, nú teir eftir tveir dystir hvørki hava fingið stig ella mál.

Enn eru fýra dystir eftir, og lítið er at ivast í, at kravið til hesar eru nýggju stig, dog so er spurningurin, hvørt leikararnir megna at liva upp til hetta.

Undan kappingini varð annars mett, at stjørnusetti B36-hópurin fór at verða so nógv tann sterkasti í landinum, men enn hevur ikki verið nógv at sæð til hetta. Skaðar hjá lyklaleikarum eiga sjálvandi sín part av frágreiðingini í hesum, men styrkin á einum liði kann ikki bert metast eftir teimum fyrstu ellivu. Hon sæst eins nógv aftur í teimum, sum av og á mugu taka til takkar við plássi á beinkinum, og her hevur B36 enn ikki sýnt, at teir hava fólkið til nakað gullmerki. Enn er krepputosið ikki av álvara farið at gera um seg, men verður hetta gongdin, kann tað í øllum førum skjótt henda.

Dysturin í tølum

HB-B36 2-0 (0-0)
1-0: Tór-Ingar Akselsen
2-0: Carsten From
Dómari: Suni Johansen

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 VB	10	9	-	1	-	0	575	459	116	28
2 VÍF	10	7	-	2	-	1	515	424	91	24
3 Stjørnan	10	3	-	1	-	6	482	482	0	15
4 StÍF	9	4	-	1	-	4	489	517	-28	15
5 Kyndil	10	3	-	1	-	6	533	549	-16	13
6 Neistin	10	4	-	0	-	6	455	487	-32	13
7 Tjaldur	9	1	-	0	-	8	400	531	-131	3

1. Deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 VÍF	11	8	-	0	-	3	722	608	114	25
2 StÍF	9	6	-	2	-	1	604	528	76	23
3 Kyndil	9	6	-	2	-	1	583	553	30	20
4 Neistin	10	4	-	1	-	5	619	593	26	18
5 KÍF	10	2	-	2	-	6	599	626	-27	11
6 H71	10	4	-	0	-	6	563	652	-89	11
7 Tjaldur	9	0	-	1	-	8	523	653	-130	4

Máltindarnir

Kvinnur

Daiva Tuomaite	VB	175	(48)
Asta Petrauskiene	StÍF	163	(41)
Danijela Ercevic	Stjørnan	162	(43)
Simona Dziugyte	Neistin	157	(54)
Sóley Mikkelsen	VÍF	146	(44)
Reda Kurkauskiene	VB	140	(19)
Lotte Sørensen	Kyndil	130	(64)
Milica Ergic	Tjaldur	122	(24)
Natasja Stamenkovic	Stjørnan	121	(9)
Lenka Ribaric	Tjaldur	112	(32)
Alina Olaru	StÍF	104	(8)
Jacklin Durhuus	VÍF	97	(9)
Nicoleta Radu	VÍF	89	(1)
Ileana Manolescu	Kyndil	88	(13)
Nikolina Eyðbjørnsdóttir	VÍF	71	

Menn

Dragisa Stojovic	Tjaldur	196	(20)
Damir Oros	KÍF	186	(41)
Áki Olsen	VÍF	149	(11)
Sveinur Justinussen	StÍF	147	(23)
Halgir D. Olesen	H71	143	(5)
Morgan Knezevic	Neistin	132	(28)
Ingi Olsen	VÍF	130	(28)
Jacob Jónsson	Kyndil	119	(7)
Áki Mørk	Neistin	116	(26)
Finnur Hansson	Kyndil	103	(13)
Costin Dumitrescu	StÍF	103	(22)
John Zachariasen	VÍF	98	
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	95	(27)
Niels Viggo Niclassen	H71	93	(1)
Petur Martin Poulsen	KÍF	91	